Summarkapping 2008
LÝSINGARTILFAR

# Føroyingar vælkomnir til Fjordbris Hotell

**Í Stavanger og har rundan um eru nógvir gistingarmøguleikar við hotellum í nógvum ymiskum prísklassum**



*Jenny og Kjetil Mehus saman við dóttrini Maren sum er kokkur á Fjordbris Hotell. Jenny er ættað úr Hósvík*

Ein av gistingarmøguleikunum er Fjordbris Hotell í Østhusvik, norðan fyri Stavanger. Tað eru hjúnini Jenny og Kjetil Mehus, sum eiga og reka hotellið. Jenny er føroysk, ættað úr Hósvík.

Jenny (f. Hansen) flutti til Norra at búgva sum 19 ára gomul í 1976. Hon giftist við Kjetil Mehus, sum er útbúgvin lýsingarmaður. Tey búsettust í Stavanger og fingu trý børn.

Í 1999 keyptu tey eini gomul handilshús við goymslubygningi í bygdini Østhusvik á oynni Rennesøy, norðan fyri Stavanger. Tey fóru beinanvegin undir gera handilshúsini í stand og gera tey um til tað sum í dag er Fjordbris Hotell.

Í 2002 seldu tey síni hús í Stavanger og fluttu til Østhusvik at búgva. Síðan er ein nýggjur bygningur bygdur afturat við hotelrúmum og íbúðum til at leiga.

Fjordbris Hotell hevur sera góðar umstøður til t.d. móttøkur, veitslur og skeiðvirksemi.



### Familjuvinarligar íbúðir

Fjordbris Hotell hevur 8 stórar íbúðir. Fýra av teimum hava tvey sovirúm, bað og gesta-wc. Fýra av íbúðunum hava 3 sovirúm og 2 baðirúm. Tilsamans hevur hotellið 26 dupultrúm, harav tey 20 eru í íbúðunum.

Íbúðirnar eru sera væl egnaði til familjur, har er køkur, internetsamband, fjarstýrd gassdrivin pais og út frá stovuni er altan.

Tað eru bert 30 minuttir at koyra úr miðbýnum í Stavanger til Fjordbris Hotell. Leiðin gongur gjøgnum tveir undirsjóvartunlar, sum eru ókeypis at koyra ígjøgnum. Eisini er gott samband við bussi til og frá miðbýnum í Stavanger.

Jenny og Kjetil eru sera fyrikomandi og hjálpsom. Tað er sum at vera í heimligum umhvørvi at kunna tosa føroyskt við tey. Elsta dótturin, Maren, er útbúgvin kokkur og starvast á hotellinum.

Tey bjóða øllum føroyingum, bæði einstaklingum og familjum at vera vælkomin til Fjordbris Hotell, sum er beint við eina listbátahavn við frálíkum útsýni.

**Puntur nr. 17**



